# Hava ongan áhuga at verja proforma-sølur

**– Vit mugu hava rætt til at geva øðrum fulltrú til at selja fiskin fyri okkum. At tað so verður misnýtt, er ein onnur søga, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna**

PROFORMA-SØLUR

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hava ongan áhuga yvirhøvur at verja proforma-sølurnar.

Tað sigur Auðunn Konráðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna.

Seinastu dagarnar er komið fram, at proforma-sølur eru framvegis ein trupulleiki á Fiskamarknaðinum, hóast endamálið við Fiskapakkanum var júst at forða fyri at tað kundi lata seg gera at selja proforma.

Men nú eru tað útróðrarbátar, sum selja proforma og ikki tey størru skipini.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at trupulleikin við proforma-sølum er nógv meiri samansettur og fløktur enn hann verður gjørdur til.

Hann ásannar kortini, at tað eru nakrir útróðrarbátar, sum selja proforma.

– Størsta stríðsmálið í sambandi við Fiskapakkan var um skip skuldi kunna geva onkrum fulltrú til at selja fiskin fyri skipið.



*– Tað eru stór hol í argumentatiónini um proforma-sølur, sigur Aðunn Konráðsson, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna*

### Hava ikki fría kapping um fiskin

Auðunn Konráðsson sigur, at tað eru mong sum vilja hava tann møguleikan tiknan úr Fiskapakkanum.

– Men tað er ikki so einfalt. Eitt línuskip avreiðir kanska 25 ferðir um árið. Men ein útróðrarbátur avreiðir kanska yvir 100 ferðir um árið. Kallanes, sum Auðunn sjálvur er við, avreiddu 130 ferðir í fjør. Og vit hava onga umstingin at selja fiskin fyri okkum og tí vilja vit hava tann møguleikan, at vit kunnu geva øðrum fulltrú at selja fiskin fyri okkum.

Hann ásannar kortini, at hetta er ein skipan, sum tíverri verður misbrúkt.

Sambært honum er talan eisini um ein annan stóran trupulleika.

– Tað verður gingið ógvuliga høgt uppí, at allur fiskur skal vera atkomuligur hjá øllum at bjóða uppá. Men veruleikin er, at eini 60-70% av fiskinum kemur aldrin á uppboðssøluna, tí virkini keypa hann beinleiðis frá skipunum. Øll tey stóru virkini keypa næstan allan fiskin beinleiðis frá skipunum og eg dugi ikki at síggja at tað er so nógv gjøgnumskygni og so stór kapping um tann fiskin, tí eisini alt tað er fiskur, sum ongin kann fáa fatur í.

– Ongin ánar, hvat tann fiskurin verður seldur fyri og tí kunnu vit ikki tosa um ein opnan marknað

– Tað merkir eisini, at nógv størsti parturin av tí, sum verður fiskað undir Føroyum, kemur als ikki á marknaðin yvirhøvur og tí er ikki talan um fría kapping um nógv tað mesta av fiskinum.

### Stór hol í

Auðunn Konráðsson sigur, at tey stóru virkini brúka eisini ein arbeiðsháttt, sum neyvan er í samsvari við hugtakið fría kapping.

– Tað er ikki óvanligt, at virkini longu avtala við skip um at keypa upsan tað fiskar, longu áðrenn túrurin byrjar. Fær nú skipið tosk og annað uppií, verður treytin frá virkinum, at tað tekur ikki upsan, fær tað ikki toskin eisini. Sostatt hevur skipið ongan møguleika at koyra sumt av lastini á fiskamarknaðin fyri at fáa betri prís og lata virkið fáa upsan, sum avtalað varð gjørd um frammanundan.

– Sostatt eru stór hol í argumentatiónini fyri fiskapakkanum, sigur Auðunn Konráðsson.

Formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna sigur, at einasta, teir hava áhugað í, er, at fáa so góðan prís fyri fiskin,sum gjørligt.

– Og tað vísir seg, at tað eru altso útflytararnir, sum geva besta prísin.

Hann sigur, at ein máti kundi verið at lóggivið, at allur fiskurin skal á marknaðin.

– Men tað er heldur ikki rætt. Tað vildi verið tað sama at tvinga allar føroyingar at keypt bil frá einum og sama bilaseljara.

– Og skulu vit tvingast til at selja til lægri prísir enn vit annars kundu fingið, hvør skal so gjalda okkum munin.

Auðunn Konráðsson ásannar kortini, at so leingi fiskur verður seldur proforma- er talan um ein trupulleika, tí tað setir marknaðarkreftirnar út av kraft.

– Men er nakar munur á, at eitt virki keypir fisk beinleiðis frá skipinum og á at ein útflytari keypir fisk umvegins proforma-sølur. Hvørgin fiskurin kemur til fría kapping. Einasti munur er, at fiskurin, sum verður keyptur beint frá virkinum, verður virkaður í Føroyum. Hinvegin geva útflytararnir tann besta prísin.

– Tað verða heldur eingi sum helst krøv sett til skipini, sum sum fiska í Barentshavinum og til uppsjóvarflotan, hvørki um, hvar tey skulu landa, ella nakað annað, sigur Auðunn Konráðsson.

– Og tað kann heldur ikki vera meiningin at binda ein part av flotanum niður, samstundis sum aðrir partar gera akkurát, sum teir vilja, leggur hann afturat.

# Fleiri fiskiskip koma í svára neyð í heyst

**– Broytast umstøðurnar ikki munandi beinanvegin, koma fleiri skip í neyð longu í heyst, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum**

FISKIFLOTI Í TRONGSTØÐU

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

Støðan hjá føroyska fiskiflotanum er nú so vánalig, at kemur ikki munandi broyting í heilt skjótt, koma fleiri skip í álvarsamar trupulleikar longu í heyst.

Tað metir Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum.

Hann sigur, at alt gongur ímóti í løtuni.

– Fiskiskapurin er vánaligur og prísurin er vánaligur, men afturfyri er oljan sera dýr.

Hann sigur, at støðan hevur ført við sær, at fleiri bátar eru lagdir við bryggju, sum støðan er.

Nær teir fara aftur til fiskiskap, er ilt at siga.



*– Hendir ikki ein stór broyting beinanvegin, kemur ein stórur partur av fiskiflotanum í svára kreppu longu í heyst, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum*

– Men eitt er í øllum førum vist og tað er, at hendir onki munagott beinanvegin í summar, verða tað fleiri skip, sum koma í álvarsamar trupulleikar, longu í heyst. Tá verður tað ein spurningur, hvussu nógvir loysa aftur.

Jákup Sólstein sigur, at støðan er so álvarslig, at nakrir bátar eru bundnir við bryggju fyribils.

– Oljuprísurin hevur sera stóran ávirkan á raksturin av einum skipi og við tí fiskiskapi og teimum fiskaprísum, vit hava nú, sigla skipini við halli við teimum oljuprísum, sum eru.

Formaðurin í reiðarafelagnum sigur, at tað er serliga trolaraflotin, sum er í svárum trupulleikum av tí høga oljuprísinum, og teir serliga teir stóru lemmatrolararnar.

– Teir, sum trola eftir uppsjóvarfiski eru í somu støðu og veruleikin er tann, at í løtuni loysir tað seg rætt og slætt ikki at trola eftir svartkjafti.

Og støðuna hjá rækjuflotanum, tímir hann ikki at nevna einaferð afturat, tí hon er vælkend.

– Við oljuprísinum, sum nu er, siglur ikki eitt tað einasa rækjuskip í heyst,

– Men veruleikin er, at allir trolaraflotin, og serstakliga lemmatrolararnir, er í heilt stórum vanda, tí teir fiska allir við halli í løtuni.

Hann ásannar kortini, at tað er ógvuliga ymiskt, hvussu trolarar eru fyri. Nakrir eru hampiliga væl fyri, men nógvir eru heilt illa fyri frammanundan, so har skal ikki nógv til afturat.

Hinvegin er línuflotin eitt sindur frægari fyri.

Jákup Sólstein sigur, at í løtuni kostar oljan umleið 3,10 krónur til 3,30 krónur fyri liturin til skipini.

– Fyrst í ár kostaði oljan niðurímóti tveimum krónum fyri liturin. Sostatt er oljan til skipini dýrkað meiri enn eina krónu fyri liturin, bara hetta seinasta hálva árið. Sostatt er oljuprísurin hækkaður meiri enn 50%, bara uppá eitt hálvt ár.

Hann sigur, at hóast støðan er so mikið hættislig hjá skipaflotanum, at stórur vandi er fyri at ein stórur partur av honum, fer av knóranum, frættist ikki eitt orð frá tí almenna.

*Hvat skuldi tað almenna gjørt?*

– Tað er nevnt fyrr, so tað er óneyðugt at endurtaka tað. Men eg kann vísa á, at seinast vit høvdu eina oljukreppu, traðkaði tað almenna til, sigur Jákup Sólstein.

## Poul Skarðenni sýnir fram á Tvøroyri

**Hann hevur einar 20-25 málningar við, sum allir eru úr Suðuroy**

LISTAFRAMSÝNING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag letur upp framsýning í listaskálanum Oynni á Tvøroyri, har Poul Skarðenni sýnir fram.

Framsýningin letur upp klokkan 17 í dag og tá verður tónleikur og okkurt at leska sær við.

Poul Skarðenni hevur einar 20-25 oljumálningar við á framsýningini og tað áhugaverdafyri Suðuroyingar er, at myndevnini eru øll úr Suðuroy.

Framasýningin er opin til 4. aug. Opið er hvønndag frá klokkan 16-18, uttan mánadag, tá er stongt.